# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands

Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**R-F109-1**

# Reglugerð
# um
# innrætting av bilgrøv v.m.

Sambært løgtingslóg nr 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, § 17, stk. 2, hevur Landsstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð. Reglugerðin er galdandi uttan mun til hvør, ið nýtir slík arbeiðsstøð.

***1. Mekanisk ventilatión.***

**Bilgrøv** skal hava mekaniska ventilatión, ið fyri hvønn tíma gevur eitt luftskifti uppá í minsta lagi 10 ferðir rúmmálið av grøvini, tó ongantíð minni enn 120 m³ um tíman. Luftin skal súgvast frá botninum av grøvini gjøgnum eitt hóskiligt tal av súgvustøðum, ið eru støðaði á ein slíkan hátt í longdarrætning av grøvini, at hetta undir øllum umstøðum gevur eina munadygga gjøgnumskoling av luft í allari grøvini.

**Víðkað bilgrøv** er kjallararúm við einum ella fleiri opum í loftinum, ið eru tilevnaði á sama hátt, sum opið í eini bilgrøv.
Hesi rúm skulu útgerast við mekaniskari ventilatión, ið fyri hvønn tíma gevur eitt luftskifti uppá 4 – 6 ferðir rúmmálið av rúminum. Við smá rúm skal tað størra talið nýtast.
Í slíkum rúmum má bert arbeiðast undir teimum opum, har akfør eru støðaði.

***2. Op og kantar.***

Fyri at forða fyri fall- og øðrum vanlukkum er tað umráðandi, at øll op og allir kantar altíð eru týðuliga merktir við gul/svørtum strípum, sambært DS 734.
Lok til bilgrøvini ella gyrðing um hesa skal verða til taks og nýtast, tá bilgrøvin ikki er í nýtslu.

***3. Uppgongdir.***

Bilgrøv skal í hvørjum enda hava fasta uppgongd (trappu, stiga ella stigatrin), har í minsta lagi ein uppgongd skal verða ein vanlig trappa.
Víðkaðar bilgravir skulu hava í minsta lagi 2 uppgongdir ella útgangir, støðaðar við størst møguligum fráleika. Tann eina uppgongdin skal verða ein vanlig trappa, meðan hin kann verða ein fastur stigi. Akfør skulu støðast soleiðis, at uppgongdirnar altíð eru fríar.
Tá talan er um serliga stór rúm, ella serlig viðurskiftir, kann Arbeiðseftirlitið seta krøv um útgongd beinleiðis útum.


***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.

***Útgivið fyrstu ferð:***

**16. mars 1999**

***Seinastu broytingar:***

***4. Gólv.***
Gólvflatan skal verða av ikki-neistagevandi tilfari og skal verða løtt at halda rein. Vælegnaðar gólvflatir er slættpussað betonggólv, ið er málað við hóskandi haldgóðari gólvmáling, ávís flísasløg v.m.

**5. Frárensl.**
Fyri at sleppa undan eldsvanda og dálking, skal frárensl frá bilgrøv altíð hava oljuútskiljara, áðrenn hetta verður ført til kloak.

***6. Ventilatorar.***
Hesir skulu verða ikki-neistagevandi. Ventilatiónsútgerðin skal altíð verða ígongd, tá arbeitt verður á hesum støðum.
Tá tað altíð er neyðugt at nýta el-ljós til arbeiði á hesum støðum, skal ein skipan gerast soleiðis, at ventilatiónsskipanin altíð ferð í gongd, tá ljósið verður tendrað og verður koyrandi til ljósið verður sløkt.
Við hesi skipan fæst trygd fyri, at ventilatiónsskipanin altíð koyrir, meðan arbeitt verður. Viðvíkjandi tí elektrisku installatiónini, verður víst til sterkstreymsreglugerðina.
Útsúgvingarskipanin til burturbeining av útstoytsgassi frá akførum má ikki kunna setast til hesa ventilatiónsskipan.

***7. Brunalig viðurskifti.***
Goymsla av eldfimum løgi í samband við bilgrøv, skal verða sambært ásetingum í fyriskipan frá Brunaumsjón Landsins um eldfiman løg frá 15. juni 1994.

***8. Annað.***
Frítikin fyri mekaniska ventilatión er bilgrøv sum:
1. er støða uttandura,
2. ikki er djúpari enn 70 cm,
3. bert verður nýtt til akfør, ið ikki eru bensin- ella gassrikin, og har treytin eisini er, at tað ikki verður arbeitt við bensin ella líknandi eldfimum løgi í ella nærhendis grøvini.

***9. Gildi.***
Hendan reglugerð kemur í gildi 16. mars 1999.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**

Eli Davidsen, stjóri